*Martin Heinesen:*

# Vónandi fer oljuleitingin í gongd seinnapartin í 1998

**Fleiri útlendsk feløg gera í løtuni seismiskar kanningar kring Føroyar, men enn skal nógv fáast upp á pláss, áðrenn vit kunnu rokna við veruligari leiting eftir olju. Men vónirnar á oljufyrisitingini eru, at farast kann í holt við veruligar oljuleitingar á heysti í 1998.**

GRÆKARIS DJURHUUS MAGNUSSEN

Mong viðurskifti skulu fáast upp á pláss aftrat, áðrenn landsstýrið kann geva oljufeløgum loyvi at leita og møguliga bora eftir olju undir Føroyum. Men sum støðan er í dag, vónar leiðarin á Oljufyrisitingini, Martin Heinesen, at alt verður greitt frá føroyskari síðu í seinnu hálvu í 1998.

Enn er kortini ómøguligt at siga, um olja finst í undirgrundini. Men seismisku kanningarnar higartil vísa, at annað enn basalt er í føroysku undirgrundini. Hetta sæst eisini aftur í stóra áhuganum, oljufeløgini kring heimin sýna Føroyum. Fleiri teirra hava keypt størri og smærri partar av seismisku kanningunum hjá Western.

Fleiri stór oljufeløg hava eisini tikið seg saman í samskipanir seinastu tíðina bert við tí eina endamálinum, at arbeiða saman um møguliga oljuvinnu í føroyskum øki. Sum dømi um slíkar samskipanir kunnu nevnast bretska BP og hollendska SHELL, og AMG-bólkurin, ið er norska Statoil, amerikanska Mobil Oil og bretska Enterprice.

## Nýggjar lógir

Millum mongu viðurskiftini, ið mugu upp á pláss, áðrenn greitt verður hjá oljufeløgum at fara undir veruligar oljuleitingar, eru lógarviðurskiftini í Føroyum. Og her hevur Oljuráðleggingarnevndin ein avgjørdan leiklut.

– Tá vit koma so langt, skal Oljuráðleggingarnevndin láta landsstýrinum álit um, hvussu farast skal fram, og hvussu eitt møguligt lógarverk skal síggja út í sambandi við oljuleiting undir Føroyum, sigur leiðarin á Oljufyristingini, Martin Heinesen.

Landsstýrið skal síðani viðgera álitið. Ikki fyrr enn tá kann tað leggjast fyri løgtingið. Tá kemur so føroyski politikarin beinleiðis inn í myndina, og skal snikka endaliga lógarverkið til.

– Tá lógarverkið er komið upp á pláss, skulu vit so taka okkum av praktisku umsitingini av víðari lisens útbjóðing. Eg rokni við, at oljufeløgini fáa einar seks mánaðir at umráða seg í, áðrenn endalig loyvi til oljuleiting verða givin, sigur leiðarin á Oljufyrisitinginí.

Roknast kann sostatt við, at loyvini ikki vera látin fyrr enn einaferð í seinnu hálvu av 1998. Men nógv óvæntað kann spyrjast, ið aftur kann føra við sær, at verulig oljuleiting ikki byrjar fyrr enn einaferð í 1999.



**Leiðarin á Oljufyrisitingini, Martin Heinesen, vónar, at viðurskiftini eru komin so væl upp á pláss í 1998, at verulig oljuleiting kann byrja í seinnu hálvu av 1998** Mynd: Jens Kristian Vang

